Tórshavnar kommuna misnøgd við arbeiði Kommunufelagsins

— Felagið mótarbeiðir Havnini og er eitt vónbrot, sigur Ôlavur Michelsen.

-Tað er órímiligt, at Havnin skal gjalda størsta limagjaldið og bert hava ein umboðsmann í felagnum, heldur Jákup Suni Jacobsen.

Tórshavnar býráð hevur samtykt at hækka limagjaldið til Føroya Kommunufelag til 0,3 promillu av skattainntøkuni frá 1. apríl í ár.

Tað var á umboðsmannafundi kommunufelagsins í fjør, at samtykt varð at hækka limagjaldið úr 0,2 promillu til 0,3 promillu av skattainntøkuni í limakommununum.

Í undanfarna fíggjarári avsetti Tórshavnar kommuna 55.000 kr. í limagjaldi til kommunufelagið, meðan hækkingin merkti, at limagjaldið hjá kommununi kom at verða 20.000 kr. meiri enn avsett á fíggjarlógini. Biðið varð um eina grundgeving fyri hækkingini. Málið hevur síðani verið til viðgerðar í fíggjarnevndini og í býráðnum. Seinast var nú hóskvøldið, har ein samd fíggjarnevnd mælti býráðnum til at samtykkja eina góðkenning av, at limagjaldið verður hækkað til 0,3 promillu frá 1. apríl at rokna.

Mótarbeiðir Havnini

Tað stóðst drúgv orðaskifti um málið á fundinum hóskvøldið, og Olavur Michelsen segði, at tað fyriliggur eingin grundgeving fyri enn, hví limagjaldið skal hækka. Hann segði, at samtykti býráðið tilráðingina frá fíggjarnevndini, so gjørdi tað ímóti einari fyrr gjørdari samtykt. Olavur Michelsen segði, at hann hevði havt tær royndir av kommunufelagnum, at felagið mótarbeiðir Havnini, og at felagið annars hevur verið eitt stórt vónbrot.

Eliesar Arge tók undir við, at kommunufelagið ikki enn hevur gjørt nakað fyri Havnina, men segði, at skal Tórshavnar kommuna hava limaskap har, so noyðist hon eisini at rinda limagjald.

Finnur Johansen segði, at kommunufelagið hevði latið Tórshavnar kommunu fíggjarætlan felagsins um grundgeving fyri, at limagjaldið mátti hækkast, og tað helt fíggjarnevndin ikki vera hoskandi grundgeving. Fíggjarnevndarformaðurin segði, at hann roknaði ikki við at fáa eina betrí grundgeving frá kommunufelagnum nú, og tí hevði fíggjarnevndin lagt eina tilráðing fyri býráðið um at góðtaka tað hækkaða limagjaldið.

— Góðtaka vit ikki hækkingina, so svøltar kommunufelagið í hel, segði Finnur Johansen, sum mælti til framhaldandi limaskap í felagnum, og at royndir eiga at verða gjørdar til tess at benda arbeiði felagsins inn á eina leið, sum Tórshavnar kommuna eisini kann verða nøgd við.

Heðin Mortensen mælti til at biða við málinum. Hann helt, at spurningurin um, hvat kommunufelagið stendur fyri, eigur at verða viðgjørdur, áðrenn støða verður tikin til hækking av limagjaldi.

Skyldar fyri eitt ár

Undir orðaskiftinum varð upplýst, at Tórshavnar kommuna skyldar limagjald fyri eitt ár. Tað var Petur Christiansen, býráðsformaður, sum upplýsti hetta. Hann segði, at kommunufelagið rokir áhugamál kommunnar mótvegis landsmyndugleikunum, og legði aftrat, at hóast hann umboðar Tórshavnar kommunu í felagnum, so hevði hann ikki skilt til fulnaðar, hvat felagið stendur fyri. Hann legði dent á, at pengar skulu til, um felagið framvegis skal virka. Petur Christiansen helt ikki, at limagjaldið var so ovurhonds stórt og mælti til at samtykkja uppskotið frá fíggjarnevndini.

Ov ring umboðan

Jákup Suni Jacobsen vísti á ójavnan í, at Tórshavnar kommuna bert skal hava ein umboðsmann í kommunufelagnum, hóast hon rindar nógv tað størsta limagjaldið. Hann mælti býráðnum til ikki at leypa framav í málinum og at útseta tað, til greiði er fingin á, hvussu nógv skatturin gevur.

— Tað er órímiligt, at vit skulu hava ta fíggjarligu byrðina, samstundis sum vit ikki hava frægari umboðan í felagnum enn sjálvt tann minsta limakommunan, helt Jákup Suni Jacobsen.

Eisini Martin Petersen mælti til at útseta málið. — Tað kann ikki skaða nakað, um vit fáa at vita, hvat teir gera har í felagnum, segði Martin Petersen.

Til hetta segði býráðsformaðurin, at útsetti býráðið avgerðina, so varð Tórshavnar kommuna strikað sum limur í kommunufelagnum.

Við atkvøðugreiðsluna vóru seks atkvøður fyri og ein ímóti. Annar javnaðarmaðurin í býráðnum, Jákup Suni Jacobsen, atkvøddi ímóti tilráðingini, sum annars varð samtykt.

-sigurd

Frælsasta blað føroyinga



Lika mikið hvussu nógv 14. SEPTEMBER gasprar av frælsishugsjónum, so er bert eitt blað í Føroyum, sum er frælst fyri hugsjónum, sum ein sendir til blaðið: Sosialurin. Eg havi gjøgnum nógv ár sent brøv og greinir til øll føroysk bløð, og eri eg komin til tað úrslit, at Sosialurin er einasta blaðið, sum **uttan sensur** tekur upp fólksins hugsan. »14. september« stendur her í eini hyklarastøðu, blaðstjórin er so fullur av primitivum konservativum fordómum, at hann skræðir og brennir brøv við øðrum meiningum, ti hann er ræddur fyri teim persónum, sum valda tí flokki, »14.« er prostituerað fyri. Ein slíkur heterogenur flokkur, sum bæði inniheldur kapitalistar og kommunistar, reiðarar og fiskimenn, framstigshugaðar og konservativar, ja, har er ringt at vita, hvat ein skal loyva sær at seta í blaðið. Tí er »14. september« eitt meiri dupultmoralskt blað enn Dimmalætting, eitt sensurerað blað, har hin neyðtikni blaðstjórin óivað livir í eini problemfyltari verð.

Øðrvísi er við Sosialinum. Eg vil vóna, at Sosialurin ætlar at halda somu kós: frælsi fyri lesarabrævskrivarar, øll brøv koma við, framburðshugsjónir í leiðarum, eitt frælst blað, sum tænir framtíðini. Halt fram við tí, Sosialurin! Eg vil heita á øll, sum ikki vilja hava hugsan sína koyrda í pappirskurvina, at ikki senda hana til 14. september, men til Sosialin, Føroya frælsasta blað **Scriberius**

BRIDGE

Fyrst ein lítil »Double Dummy«:

Ongin trumfur. Suður spælir út.N-S skulu taka øll stikkini.

Loyns niðast á síðuni.

	sp 8 hj 7-2 rú 8-2 kl 3-2	
sp 6-5-4 hj 6-5 rú 7-6 kl —	N V E S	sp — hj 4-3 rú 5-4 kl 7-6-5
	sp 7-5-2 hj — rú 3 kl 9-8-4	

Á seinasta aðalfundi í FBS varð viðtikið, at nevndin í FBS skuldi royna at fáa í lag kappingar við onnur lond, helst norðurlond. Nógv hevur verðið hugsað og tosað um málið, men ikki kann sigast, at nevndin hevur gjørt nógv annað við málið. Onki er tí ikki hent — og orsøkin til, at nevndin hevur drálað, er lutvist tí, at Danmarks Bridgeforbund gjøgnum fyrrverandi formannin í Havnar Bridgefelag, Joen H. Andreassen, hevur heitt á føroyingum luttøku í norðurlendskum bridgesamarbeiði og hevur enntá gjørt sær tann ómak at gera Nordisk Bridge Union kunnigt um okkara tilveru sum sætta norðurlanda bridgetjóðin.

Nevndin fyri FBS hevur á fundi 6. apríl viðgjørt spurningin, og er bræv á veg til NBU um moguleika fyri limaskapi har.

Tað kann henda, at politiskir trupulleikar koma at seinka upptøku — NBU hevur reglu um, at limalondini skulu kunna gerast limir í Europea Bridge League, ið aftur hevur reglu um, at bert sjálvstøðugar tjóðir kunnu gerast limir har, men hetta er helst nakað, ið ein loysn skjótt verður fingin til vega um.

Givið er, í hvussu so er, at skal ikki afturgongd koma í, mugu vit samarbeiða við aðrar og luttaka í kappingum við onnur lond.

★

Eitt annað mál, ið hevur ligið á láni, er undirvísingin. Skulu vit yvirhøvur gerast kappingarførir, mugu vit hava eina regluliga undirvising, har vit leggja størsta dentin á ungfólkið. Aðrastaðir er vanligt, at hetta verður gjørt í samstarv við fritíðarundirvísingina í kvøldskúlunum, og vildi hetta her hjá okkum helst eisini verðið besta loysning.

★

FM-liðkappingarnar standa fyri durunum. Fyri fyrstu ferð er neyðugt at spæla í tveimum bólkum.

Liðini í meistarabólkinum eru hesi: Bridgedeild Kaggans, Havnar Bf., Nýggja Bf. og Vágs Bf.

Liðini í kvalifikatiónsbólkinum eru: Fuglafj. Bf., Klakksvíkar Bf., Tvøroyrar Bf., ága Bf., Vestm. Bf. og Uttara Bf. (úr Vági).

Í meistarabólkinum spæla liðini tveir dystir móti hvørjum øðrum, fyrra í Havn 1. og 2. mei og seinra í Vági 13. og 14. mei.

Kvalifikatiónsbólkurin spælir trý umfør í Havn 1. og 2. mei og tvey á Tvøroyri tann 15. mei.

Sum sagt eru vit ikki umboðað í VM enn — annars hevði annar parturin verðið noyddur at flutt kappingina. VM verður nevniliga spælt 2. —&. mei og Bridgeolympiadan 9.-22. mei í Monte Carlo.

★

So var tað loysnin á uppgávuni:

Norður verður spældur inn við sp 8 og suður tekur fyri kl 8 og sp 7. Norður og eystur goyma annan reyða litin, vestur hin. Tá ið norður nú tekur fyri hj 7 og rú 8, ver-ur eystur skvisaður. **Mortan**

Skírhósdagur

Havnar kirkja: kl. 11 lestur, kl. 18 altargangur v/Hans J. Joensen. Vesturkirkjan kl. 11 gudstænasta við altargangi v/Kjartan Mørkøre. Kalbak kl. 12 gudstænasta við altargangi v/Hans J. Joensen. Skopun kl. 12 gudstænasta við altargangi v/Ejvind Vilhelm. Sand kl. 18 gudstænasta við altargangi v/Ejvind Vilhelm.

Langafríggjadagur

Havnar kirkja: gudstænasta v/Hans J. Joensen. Vesturkirkjan: lestur. Argjar kl. 11: gudstænasta við altargangi v/Kjartan Mørkøre. Hvítanes kl. 18: gudstænasta v/Kjartan Mørkøre. Skálavík kl. 12: gudstænasta við altargangi v/Ejvind Vilhelm. Húsavík kl. 18: gudstænasta v/Ejvind Vilhelm.

1. páskadagur

Havnar kirkja: gudstænasta v/Ejvind vilhrlm. Vesturkirkjan: gudstænasta v/Kjartan Mørkøre. Nólsoy: gudstønasta v/Hans J. Joensen.

2. páskadagur

Havnar kirkja: lestur. Vesturkirkjan: gudstænasta v/Hans J. Joensen. Hestur: gudstænasta við altargangi v1Kjartan Mørkøre. Kirkjubøur: gudstænasta v/Ejvind vilhelm.